# Løgmaður setir Regatta

Føroya løgmaður setir Atlantic Airways Færø Regatta, sum verður í Ishøj leygardagin. Sjálvt tiltakið byrjar klokkan 11.00, tá øll savnast við felagshúsið Neystið. Fimm korter seinni setir Kaj Leo Johannesen tiltaki, sum varar til klokkan fýra um morgunin, tá dansurin við The Reverends endar. Tað er føroyska róðrarfelagið í Ishøj, Neystið, ið skipar fyri Færø Regatta. Fleiri upplýsingar um tiltaki eru til taks á www.neystid.dk



# Vaktu ans í Tipsbladet

Danske Tipsbladet plagar at fylgja við tí mesta, sum fyriferst innan fótbóltin, og tað vakti ans á redaktiónini, tá føroyski U21-sigurin móti Russlandi var veruleiki. Undir yvirskriftini »Færøsk sensation« verður avrikið hjá føroyska liðnum lýst sum størsta sensatiónin á føroyskari fótbóltsjørð. Víst verður í hesum sambandi á, at størsta bragdið hjá føroyska fótbóltslandsliðnum yvirhøvur fór fram á uttanveltaðum vølli í Svøríki.

# Flentu eftir føroyingunum

**Undan dystinum høvdu russisku spælararnir hug at niðurgera føroysku mótstøðumenninar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Høgt kall gevur høgt fall!

Tað var í øllum ein læra, sum russiska U21-landsliðið í fótbólti fekk við sær av ovara vølli í Gundadali í gjár.

Undan dystinum varð mett, at russiska liðið hevði á leið somu styrki sum tað rumenska, ið vann tryggan sigur á Føroyum leygardagin. Tann dystin høvdu russar sjálvandi sæð, og tí mundu teir ikki ivast í, at talan bara var um ein dyst, sum skuldi fáast frá hondini.

- Tá vit stóðu í gongini í B36-húsinum. Til reiðar at fara á vøllin, flentu teir forhánisliga eftir okkum. Ivaleyst høvdu teir sæð dystin hjá okkum móti Rumenia, so teir ætlaðu sær helst ein heilt léttan sigur her, sigur



*Undan dystinum høvdu russisku spælararnir hug at gera gjøldur burtur úr føroyska liðnum, segði Bill McLoud Jacobsen, sum er annar av føroysku venjarunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Bill McLoud Jacobsen, sum er annar av føroysku venjarunum.

Tað tók altso bara 58 sekund hjá føroyingunum at turka smílið av russisku andlitunum, og sjálvur heldur Bill, at talan var um eitt framúr avrik, sum heilt víst ger sítt til, at dagurin í dag verður ein av teimum heilt góðu.

- Hatta var jú heilt fantastiskt hjá okkum, og tað er stuttligt at koma úr seingini ein slíkan dag sum í dag. Nú ræður so bara um at njóta løtuna hjá okkum. Eg havi ongar sum helst ætlanir fyri dagin sum so, men eg fari so ein túr niðan á Tórsvøll, tá A-landsliðið spælir. So fáa vit at síggja, hvussu leikur fer har, sigur Bill McLoud Jacobsen.

# Landsfevnandi fjepparatiltak

**12. maður er ikki heilt so aktivur longur, men fjepparafeløgini kring landið hava stáplað eitt felags átak á beinini, so stuðulin til Serbia-dystin kann gerast tann best gjørligi**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinnu árini hava føroyskir fótbóltsfjepparar skipað seg í verulig fjepparafeløg hjá ymsu Vodafone-liðunum.

Samstundis er áhugin fyri 12. manni, sum er fjepparafelagið hjá landsliðnum, minkaður munandi.

Men hetta skal ætlandi broytast í dag. Dan Brimsvík, sum er ein av hvítu tikarunum, sum stuðla B36, og saman við øðrum hevur hann tikið stig til eitt felags fjepparaátak í dag.

- Tað hevur verið tosað um tað fyrr, og nú eru vit bara farnir í holt við tað. Vit hava fingið eina sektión á Tórsvølli, har vit ætlandi skulu bæði trumma og larma, og vit vóna veruliga, at hetta kann vera við til at stuðla landsliðnum, sigur Dan Brimsvík.

- Sjálvur dagurin hjá okkum byrjar klokkan 15 á Café Mica í Miðbýnum, og



*Stuðulin til A-landsliðið hevur ikki verið heilt so stórur seinastu tíðina. Men tað er nakað, sum fjepparafeløgini kring landið nú vilja broyta*

so verður hitað upp til brakið á Tórsvølli. 12. maður hevur eisini verið lagaligur mótvegis okkum, so vit hava andlitsmáling og alt tað, sum hoyrir fjepparum til, sigur Dan.

Hann leggur afturat, at øll eru vælkomin til fjepparaátakið, og er onkur, sum ynskir at frætta nærri um hetta, eru tey altíð vælkomin at ringja til Dan á telefon 250099.

## Gott at skylda uppá

**Russisku spælararnir tosaðu undan dystinum um, at tað var ein trupulleiki hjá teimum at spæla á grasliki. Góð undanførsla, segði Abraham Løkin um hetta**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av mongu áskoðarunum í Gundadali týskvøldið var Abraham Løkin, sum nú eisini er ein av hjálparvenjarunum hjá A-landsliðnum.

Meðan spenningurin í dystinum var upp á tað hægsta, fekk Rás2 orðið á hann. Millum annað vísti tíðindamaðurin á, at russisku spælararnir undan dystinum høvdu nevnt, at graslíkið kundi gerast ein trupulleiki hjá teimum. Men hesum var Abraham Løkin als ikki samdur í.

- Sjálvandi er tað ein fyrimunur fyri okkara spælarar, at teir spæla á einum undirlagi, sum teir eru vanir við. Men eg dugi slettis ikki at síggja, at hetta skal vera ein trupulleiki hjá russunum. Vøllurin her er veruliga góður at spæla á, og í Russlandi spæla teir nógvar av sínum dystum á graslíki, so eg dugi ikki at skilja tær atfinningarnar.

So tú vilt kanska kalla hetta fyri tað bera grenj?

- Grenj veit eg ikki. Men tað kann jú vera gott at skylda uppá, um tað nú skuldi víst seg, at dysturin ikki gongur eftir vild hjá teimum, staðfesti Abraham Løkin.